# Foreldur skelkað av handfaring av dagstovnaflyting



**Frítíðarskúlin í Stoffalág í Havn flytir til Hoyvíkar. Hetta er sum ætlað, men øvugt av tí, sum foreldur, børn og starvsfólk hava fingið at vita, so fylgja starvfólkini ikki við av sær sjálvum, men teimum stendur frítt fyri at søkja starv á nýggja stovninum. Fleiri børn við serligum tørvi, og sum ikki hava gott av ov nógvum broytingum, eru á stovninum. Foreldrini eru skelkað av møguligu broytingunum**

FRÍTÍÐARSKÚLI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

At Frítíðarskúlin í Stoffalág 60 flytir í nýggj høli við Hoyvíkar Skúla, er ikki nakað nýtt, men ein løgd ætlan, ið verður fylgd.

Og sum so er onki galið í hesum.

### Onnur boð

Hinvegin hava starvsfólk og foreldur verið kunnað um gongdina og fingið at vita, at sjálvandi fylgja starvsfólkini frá Stoffalág 60 við, tá flutt verður; hetta hevur alla tíðina ligið í kortunum.

Men hósdagin fingu tey so onnur boð, sambært einum pápa, ið hevur barn á stovninum.

Pápin, sum Sosialurin hevur tosað við, er skelkaður av gongdini.

– Hósdagin fingu vit at vita, at starvsfólkini kortini ikki flyta við í flytingini av sær sjálvum, men tey hava sjálvandi møguleika at søkja starv á nýggja stovninum. Hetta er skelkandi, tí vit hava verið í góðari trúgv, og óivað starvsfólkini eisini, sigur pápin.

– Foreldrabólkurin umrøddi støðuna hósmorgunin og semja var um, at hetta átti ikki at fara framvið uttan átalu. Vit hava verið sera væl nøgd við frítíðarskúlan og starvsfólkini har, og hetta hava tey ikki uppiborið.

### Børn við serligum tørvi

Orsøkin til, at tað er so umráðandi við somu starvsfólkum er m.a., at fleiri børn við serligum tørvi eru í frítíðarskúlanum. Tey hava ikki gott av ov ógvusligum broytingum, so sum starvsfólkaskifti.

– Sum um tað ikki var nóg mikið við tí, at tey skulu flyta í nýggjar umstøður, sigur pápin, sum er millum teirra, ið hava barn við serligum tørvi.

Hann metir handfaringina av málinum at vera illa umhugsaða.

– Hetta fer at geva órógv í okkara heimi eftir summarfrítíðina, staðfestir óttafulli pápin, sum hugsar um barn sítt, ið ikki hevur óneyðuga órogv í gerandisdegnum fyri neyðini.

At barnið hevur fingið at vita, at bert sjálvar hølisumstøðurnar verða broyttar, men at nú eisini starvsfólk kortini verða skift út, er als ikki nøktnandi, sambært pápanum, ið ásannar, at foreldrini neyvan kunnu broyta gongdina, men at neyðugt er at gera vart við viðurskiftini.

Sosialurin ætlaði at fáa eina viðmerking frá umsitingini hjá Tórshavnar Býráð um viðurskiftini, men rætti viðkomandi er ikki at hitta hesa vikuna og er ikki aftur fyrr enn í næstu viku.

# Vágbingar siga farvæl við søguligt hús

**Tann 13.juni verður skipað fyri mentanartiltakið við gamla kommunukontórið í Vági. Húsini eru gomul og verða tikin niður dagin eftir tiltakið, men fyrst skal søgan minnast**

SØGA OG MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Gamla kommunukontórið í Vági var einaferð stásiligt hús og m.a. finst mynd, har Margretha Drotning sum smágenta stendur og veitrar á altanuni á hesum húsunum.

Ovast í einum skjøldri er glaspláta, har vøkur slupp er málað á. Tað var Morell, maður Ruth Smith, ið málaði hetta. Og ætlanir eru um at varðveita hetta vakra minni, men restin av húsinum er ikki til at bjarga.

Seinastu árini hevur Miðnámsskúlin nýtt bygningin sum bókasavn og í nøkur ár hevur Musikkskúlin eisini nýtt hølini.

### Søga

Men alt hetta gerst brátt søga, tí mikudagin 14. juni verða húsini tikin niður. Tíðarinnar tonn er farin við húsum, ið ikki standa til at bjarga.

Men dagin fyri, tann 13. juni, verður tiltak í húsinum, har søgan verður í hásæti, innan húsini falla.

Talan verður um tiltak við røðum, gomlum myndum og tónleiki.

Titakið snýr seg í stuttum um søguna frá 1930 og til dagin í dag. Og so geva ymisk eitt boð uppá, hvussu tey ímynda sær seg sjálvan, Vág og Suðuroynna um 30 ár, sigur Ulf Nordlund, stigtakari.

Røðarar vera ymisk, ið hava havt við húsið at gera millum ár og dag og tey, ið geva boð uppá framtíðarútlit í Vági.

Røðarar eru Amy Eystberg, ið tænti í húsunum í triatiárunum, Torleif Augustinussen, Jógvan Krosslá, Torgerð Suðuroy, Johan Dahl, Dennis Holm, Christian Solberg og Egil Steintórsson vegna VB og Johild og Katrin vegna Miðnámsskúlan. Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri, endar tiltakið.

Tónleikinum standa musikkskúlanæmingar fyri, eins og Niels Nolsøe spælir klaver og Sigmundur Olsen og Karin Brattaberg syngja. Eisini luttaka troubadourarnir Niels Petur Nolsøe og Arnfinn Thomassen.

Tiltakið byrjar klokkan 19:15.



# Jens Guð fegnast um Asfalt

**Jens Guð er íslendskur miðlamaður við skili fyri tónleiki. Hann hevur nú í mong ár havt stóran áhuga fyri føroyskum tónleiki og hevur stórt innlit og fylgir væl við. Jens Guð er heimmildarmaður hjá Sosialinum í Íslandi og hann hevði eisini leitað sær á Asfalt at hoyra nakað av tí, ið fer fram á føroyska tónleikapallinum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Íslendski tónleikaserfrøðingurin Jens Guð leitaði sær á Asfalt seinasta vikuskifti. Hann hevur seinnu árini ognað sær serkunnleika innan føroyskan tónleik og hann fylgir væl við.

Hann fegnast um tað hann sá, men okkurt er eisini, ið hann hevur hug at havast at.

Honum eydnaðist ikki at hoyra fyrstu bólkarnar fríggjadagin, men tað hann hoyrdi, gjørdi hann fegnan og bilsnan.

– Eg hoyrdi fyrstuferð um Asfalt á Atlantic Music Event í Reykjavík og tað undraði meg, at tað ber til at savna 60 føroyskar bólkar. Hafnafjørður og Kópafjørður svara til Føroyar í fólkatali, men neyvan ber til at savna meira einn 10-15 bólkar har. Og í teimum mongu ymsu plássunum kring Ísland tilsamans ber neyvan til at savna 60 íslendskar bólkar til ein festival, tí í hvørjum stað eru ofta ikki fleiri enn ein ella tveir bólkar, sigur Jens Guð

– Og so skal havast í huga, at størstu nøvnini vóru ikki við á Asfalt, so sum Eivør, Týr, Teitur, Yggdrasil, GoGo Blues og onnur, sigur Jens Guð.

Men hóast hetta, so metir hann ikki, at hetta merkti festivalin, tí hann hoyrdi so nógv áhugavert, at hann als ikki eydnaðist at hoyra alt, ið hann hevði settt sær fyri.

– Bólkarnir, ið eg hoyrdi, vóru so áhugaverdir, at eg kundi ikki fara frá teimum fyri at lurta eftir onkrum øðrum um somu tíð, greiðir Jens Guð frá.

### Makrel og Side Effect

– Eg kom nakað seint til Havnar. Hetta var eg sjálvur orsøk til, og eisini spældi tíðarmunurin millum Ísland og Føroyar inn, men eg sá ikki fyrstu bólkarnar, hóast fleiri vóru, ið eg fegin vildi sæð. Fyrsti bólkur eg hoyrdi var Makrel. Tað merkir, at eittnú Marius, Lena og Hanus høvdu spælt og tey hevði eg fegin viljað hoyrt. Eg havi hoyrt tey øll í Íslandi og tey eru øll góð á palli. Lena ger góðar fløgur, men er framúr góð á palli, sigur Jens Guð.

– Hetta var sjeynda ferðin eg hoyrdi Makrel á palli síðani 2002, og eg troyttist ikki av teimum. Rasmus er ein av mínum yndis sologuitarleikarum, og tað er ein frøi at uppliva, hvussu hansara stílur er púra náttúrligur og heimahoyrandi hjá honum, metir Jens.

– Side Effect havi eg ikki upplivað áður. Onkur segði mær tó, at teir spæla punk rock og annar, at talan er um techno. Bæði eru røtt, tí talan er um techno punk. Teirra orkumikli tónleikur blásti meg púra burtur og tók meg av fótum. Teir hugnaðu sær og og høvdu so nógva orku. Eg hugnaði mær og mátti fáa hendur á nýggju fløgu teirra, sum eg lurti nógv eftir fyri tiðina, sigur Jens Guð.

### Fleiri góð.

– Eg fari ikki at reksa øll nøvnini upp, tí so gerist eg keðiligur og endurtakið meg sjálvan. Eg hevði upplivað 15 av nøvnunum á Asfalt á palli áður og var fegin at síggja tey aftur – og sjálvandi keddur um tey, ið eg ikki náddi at hoyra. Men tað var gott eisini at hoyra okkurt nýtt, sum Rókur t.d., ið eg upplivdi, tá eg legði leiðina framvið Cippo, og hann rúnarbant, so eg fór ikki avstað aftur, greiðir Jens frá.

– Eisini var gott at síggja Anniku Hoydal á palli aftur. Harkaliðið var væl umtókt í Íslandi í sjeytiárunum, ella kanska áðrenn tað. Hon skuffaði ikki á palli. Góð og livandi og við góðum bólki. Stuttligt hjá mær at uppliva Kaj, sum annað enn trummuleikara, tí eg kenni hansara góða trummuspæl frá Taxi, sigur Jens Guð.

– Høgni er ein tónleikari við eini enn betri framførslu á palli, enn hansara annars frálíku fløgur, tí hann hugnar sær veruliga. Sum heild var Asfalt perfekt. Mangir bólkar á høgum støði. Eitt minus var tó, at ov nógvir áhugaverdir bólkar spældu samstundis, men tað hjálpti, at so nógv ymisk sløg av tónleiki vóru. Og tað var væl hugsað at hava alt tiltakið á einum lítlum øki og veðrið hepnaðist eisini væl, so eg hevði góðar upplivingar og gleði meg til næstu ferð, sigur Jens Guð.

*(Les í næstu viku; Jens Guð um tað, at føroyskir bólkar hava ensk nøvn og syngja á enskum)*